## Gazza royndi sjálvmorð



Falna fótbóltslegendan, Paul Gascoigne, royndi í gjárkvøldið at gera enda á sær sjálvum eftir at hann hevði skrivað seg inn á eitt hotel í miðbýnum í London. Hann bílegði ein búff frá room-service, men ringdi síðani niður í móttøkuna og bað um bert at fáa knívin. Men stúrin starvsfólk vildu ikki geva honum knívin, tí tey stúrdu fyri, at hann ætlaði at skera blóðæðrarnar av. Løgreglan varð boðsend og stutt eftir at hon kom á staðið, royndi Gascoigne at drukna seg í baðikarinum, skrivar enska blaðið The Sun.

## 1000 flutt av skipi

Letlendska vaktar- og bjargingartænastan ger segn ú til reiðar at flyta knappliga 1000 fólk av ferðamannaskipinum Mona Lisa, sum hevur rent seg fast uttanfyri lettisku strondina. Bjargingarmanning hevur alla nátt roynt at toga skipið av aftur einum sandbanka 18 kilometrar frá strondini, men teir eru nú givnir við royndunum. Nú skulu so tey 651 ferðafólkini og partar av 333 mans stóru manningini flytast av skipinum yvir á tvey lettisk herskip, sum síðani skulu sigla fólkið til Ventspils, skrivar Politiken.

# Menna Føroyar við fínum mati

**Landsstýriskvinnan í vinnumálum sær stórar møguleikar í eini veruligari matvøruvinnu í Føroyum og tí vil hon menna kokkaskúlan í Klaksvík og gera hann til eitt stovn til at menna fínan, føroyskan mat**

MATLIST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Er tað nakað, vit eiga at gera í Føroyum, er tað at gera fínan mat, sum kann seljast til allar okkara gestir.

- Tað segði Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, tá ið fíggjarlógin var til viðgerðar í Løgtinginum.

Hon sær matvøruvinnuna sum eina sjálvsagda vinnu at menna í Føroyum, nú vit tosa um at fjøltátta okkara vinnulív, eitt nú at menna ferðavinnuna.

Tí skjýtur hon upp, at vit menna kokkaskúlan í Klaksvík og gera hann til ein veruligan stovn sum skal menna fínari matgerð í Føroyum og fínari matvøruframleiðslu.

- Hann skal verða ein miðdepil fyri matlist í Føroyum, legði hon afturat.

- Tí er tað rætt at menna kokkaskúlan í Klaksvík til at útbúgva kokkar og tænarar, sum kunnu arbeiða á teimum heilt fínu matstovunum, tí ferðafólk gjalda fegin fyri fínan mat, tí tað er eitt tað týdningarmiklasta fyri ferðafólk.

Hon sigur, at tað er ein stórur trupulleiki, at tað gongst so illa hjá okkara matstovuvinnu at fáa væl útbúnar kokkar og tí eiga vit at menna kokkaskúlan.

- Vit hava allar møguleikar, tí vit hava eitt reint umhvørvi og vit hava ótrúliga góða rávøru og í Klaksvík hevði ein matvørustovnur ligið væl, tí har er nógv fiskivinna.

Fleiri politikarar úr fleiri fólkum tóku fult undir við hugskotinum um at menna ein veruligan matvørudepil.



*Matlist er ein sjálvsøgd, framtíðar vinna í Føroyum, heldur Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum*

# Bannið koyring sunnudag

**Undir oljukreppuni í 1973 bannaði landsstýrið koyring sunnudag, eins og politisku myndugleikarnir í nógvum londum kring okkum, gjørdu. Í lesarabrævi í blaðnum í dag mælir Poul Hansen, advokatur, til aftur at innføra bann móti privatkoyring sunnudag, ístaðin fyri at útbyggja vatnorkuna**

ORKA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Fyri 35 árum síðani bannaðu myndugleikarnir í nógvum londum, eins og í Føroyum, privatkoyring sunnudag orsakað av umfatandi oljukreppu kring alla heim. Poul Hansen (t.v.) heldur, at hetta eigur at verða sett í verk aftur ístaðin fyri at útbyggja vatnorkuna. Her avmyndaður saman við Hákuni Djurhuus, stjóra í Sev, eftir at teir báðir vóru gestir í tíðindasendingini á Rás2 á middegi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri at økja el-framleiðsluna frá verandi orkukeldum úr 45 til 55 prosent hevur SEV sett sær fyri at útbyggja vatnorkuna í Dølum og við Víkavatn á Streymoynni og allari eystursíðuni á Vágoynni. Orsøkin sigst vera at minka um $CO_2$ útlátið.

Soleiðis byrjar Poul Hansen, advokatur, eitt lesarabræv í blaðnum í dag. Poul Hansen, sum er ivrigur rossamaður og ferðast nógv í føroysku náttúruni, heldur vera skeivt at útbyggja vatnorkuna meiri í Føroyum.

»Samstundis sigur nýggi SEV stjórin í Dimmu nr. 70 frá 11/4-2008 (Punktum.fo) at vit – Føroyar – eru á einum 5. plássi í Europa, hvat viðvíkur el-framleiðslu av varandi orkukeldum. Hetta prógvar, at okkara el-framleiðsla er ógvuliga ”grøn” og at einki er at finnast at henni hesum viðvíkjandi. Vit skulu minka um $CO_2$ útlátið, men ikki við at útbyggja vantorkuna og seta fleiri av okkara fáu dølum undir vatn ella turrleggja okkara fáu eftirverandi vatnfátæku áir«, skrivar Poul Hansen, sum eisini heldur tað ver vitleyst fíggjarliga at útbyggja vatnorkuna

»Okkara $CO_2$ útlát skal minka og tað fer at minka av sær sjálvum komandi 2 árini, tá heimaflotin verður noyddur at tillaga veiðuorkuna til tilfeingið. $CO_2$ útlátið fer eisini at minka munandi næstu árini við teimum frambrotum ið henda innan sólkyknur, húsarhaldsmyllum v.m. og vilja minka uppaftur meira um løgtingið frítekur alla slíka útgerð fyri mvg. Harumframt vilja sparingar í olju/el-nýtslu eisini í stóran mun minka $CO_2$ útlátið«, skrivar Poul Hansen og kemur við einum uppskoti ístaðin at gera nakað fyri at avmarka bilkoyringina.

»Lat okkum veruliga seta Føroyar á heimskortið – ikki við at hava fyrrverandi USA forsetar og varaforsetar 1 dag í Føroyum (einki galið í tí) – men við at minka $CO_2$ útlátið á tann hátt, at vit banna allari privatkoyring sunnudag. Mær kunnugt hava onnur ikki gjørt tað, so hví ikki vera tey fyrstu at gera hetta og í verki veruliga vísa okkara virðing fyri náttúruni í staðin fyri at byrgja fáu livandi áir og dalar okkara aftanfyri betong og asfalt«.

Hann heldur, at tað vit megnaðu undir oljukreppuni í 1973, megna vit aftur, um viljin er til tess. Poul Hansen, sum var gestur í tíðindasendingini á Rás2 á middegi, vísir á, at tað verður heldur ikki verri fyri fólkaheilsuna, at fólk ganga og ikki koyra sunnudagar.

Stjórin í Sev, Hákun Djurhuus, sum eisini var gestur í tíðindasendingin, sigur, at hann sjálvandi er til reiðar at taka eitt orðaskifti um vatnorkuútbyggingina, men vísir á, at hetta er ein politiskur spurningur at taka støðu til.